# Norrøna fingið brúgv

Tíðliga mánamorgunin á Flenderwerft skipasmiðjuni í Lübeck í Týsklandi var brúgvin sett á nýggju Norrönu.

Tann 24. august skal skipið sjósetast, og sigur Kári Durhuus, talsmaður fyri Smyril Line, at alt gongur eftir ætlan, og Norröna verður klár at sjóseta til tíðina.

Tá skipið er sjósett skal alt innan gerast, og síðani verður hon klár at senda til Føroya. Hetta verður eftir ætlan í mars mánaða næsta ár.

*ib*



*Nýggja Norröna, sum verður bygd á Flenderwerft í Lübeck, hevur nú fingið brúgv*


# Fíggjarfólk



**Søkt verður eftir fíggjarfólki til raksturin av innkrevjingarskipanini hjá Vágatunlinum og aðrar uppgávur í sambandi við virksemið hjá felagnum, herundir bókhald v.m.**

**Førleikakrøv**

Tann rætti umsøkjarin

- hevur fíggjarliga útbúgving so sum HD, merkonom ella aðra hóskandi útbúgving
- hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur royndir frá arbeiðsmarknaðinum
- hevur kunnleika til føroyskt og enskt mál

**Lønar og setanartreytir**

Miðað verður ímóti at seta starvið 1. september 2002, ella eftir nærri avtalu. Løn og setanartreytir annars eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350200 ella teldupost drh@tunnil.fo.

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. august 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu sendast til:

Vágatunnilin p/f
Postboks 1010
110 Tórshavn

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.tunnil.fo


# Vilhelm Johannesen seksti

Sjálvur dagurin var 4. august, og føddur var hann í 1942. Var tað við gildisborðið, hevði onkur havt á munni, at Vilhelm er føddur í harðastu krígsorrustu, ei undur í, at hann er so snarur.

Men nú er hann sekstugur, klaksvíkingurin og løgtingsmaðurin, Vilhelm hjá Betuel, sonur Estrid og Betuel.

Nú síggja vit hann ofta tita í Havnargøtum, sum hevði hann »stundir trongar«.

Alt síðan dreingjaárini hevur hann brúkt evni sum stundir til at tæna í so mongum og ymiskum. Lívsyrki hansara at vera postboð er kanska ímyndin av honum, men eisini kent víða. Megnarverk hevur hann skrivað um postverkið, og tí ynskja vit honum somuleiðis tillukku við.

Vilhelm var nógv uppi í skótarørsluni, hjá honum var KFUM støðufesti øll ungdómsárini, og sohvørt hann mentist, varð hann brúktur í so mongum viðurskiftum.

Í samstarvinum millum hann og Villa Sørensen, sála, var Vilhelm hjólið, ið ikki kundi koblast burturúr í gerandispolitiska arbeiðinum, skjótt varð hann uppi í tí mesta.



Hollur stuðul hjá Sosialinum og fyribilsblaðstjóri er hann longu í 1968, tá Villi Sørensen varð valdur landsstýrismaður. Síðstu ferð stendur hann sum ábyrgdarblaðstjóri í kolofonini á Sosialinum 17. november 1979, tá varð Vilhelm Johannesen nakrar dagar seinni valdur landstýrismaður.

Snarur er hann í talu sum skrift, ljósa lyndi hansara er so lívsjáttandi, hesar dýru íbornu gávurnar. Vilhelm dugir at føra pennin, at valla er vika, at onkur spyr, hví vit ikki oftari síggja politisku viðmerkingar hansara!

Vilhelm hevur verið landsstýrismaður í tveimum umførum, 1979-81 og 1985-89 og tingmaður hevur hann verið fyri Norðuroyggjar síðani 1980 – valdur fyri Javnaðarflokkin.

Nú eru tvær bøkur komnar um løgtingið, har fært tú eisini tað mesta at vita um løgtingslimir, og vilt tú vita okkurt atfrat um Vilhelm, ber til at lesa sær til, hóast heldur ikki tað sigur alt.

Tillukku, Vilhelm og hjartaligar heilsanir, eisini til Johild og børnini.

*j.l.*



# Føroya Tele í hernað ímóti teldufarsótt

**Telduvirus hava leingi gjørt lívið súrt hjá mongum meinigum telduánara, og seinasta árið er hendan telduborna farsóttin stórliga versnað. Nú tekur Føroya Tele stig til at kanna allan elektroniskan post, ið fer um post.olivant.fo postskipanina fyri virus. Málið er at gera skipanina fullkomuliga virusfría innan hendan vikan er lokin.**

VIRUSSTRÍÐ
*Rúnar Reistrup*

Á IP-net deildini hjá Føroya Tele, sum húsast á Hálsi í Havn, sita nakrir telduserfrøðingar, sum burturav arbeiða við at hava eftirlit við netinum hjá Føroya Tele. Teirra fremsta uppgáva er at forða fyri virusskaða og álopum frá hackarum, sum støðugt royna at finna trygdarhol í telduskipanum hjá fyritøkum og privatum, ið eru íbundin internetið ígjøgnum Føroya Tele.

Og teir hava ivaleyst at taka sær til.

- Virustrupulleikin er vaksin alsamt hetta seinasta árið. Eitt dømi um hetta er, at ein vanligan dag fáa eg millum 20 og 25 emailar sendar á mína adressu her á Føroya Tele. Hetta eru emailar frá fyritøkum og privatfólki, sum í flestu førum als ikki vita um, at tey hava virus, og eiheldur eru varug við, at hesi virus sjálv hava syrgt fyri at senda mailar út til tey, sum standa á adressulistanum í emailforriti teirra, greiðir Páll Wiberg Joensen, leiðari á IP-net deildini á Føroya Tele frá.

- Eg vildi mett at eini 90 prosent av teimum, sum hava virus á telduni, vita ikki av tí, og har liggur tann størsti trupulleikin, tí virusini sleppa at liggja í frið og breiða seg støðugt til onnur. Fólk hava einaferð installerað ein virusskannara, og so gloyma tey alt um hann, og halda væl standa til. Men nýggj virus verða síggja dagsins ljós at kalla hvønn dag, og tí er ein virusskannari einki verdur, um ikki hann verður dagførur javnan. Av tí sama vita fólk ikki av, at telda teirra hevur virus, hóast tey flestu munnu hava okkurt slag av virusskannara, sigur Páll Wiberg Joensen.

*Runt roknað verða 56.000 emailar um dagin sendir ígjøgnum postskipanina hjá Føroya Tele, fleiri hundrað teirra eru virusmailar*



## Kanna alt

Nú virustrupulleikin tykist at vaksa støðugt, hóast nógv verður upplýst um virusverju, hevur Føroya Tele tikið eitt umfatandi stig fyri at basa trupulleikanum. Allur postur, sum verður sendur til ella frá einari adressu av slagnum navn@post.olivant.fo, sum allir internethaldarar hjá Føroya Tele hava, fara ígjøgnum postservaran hjá Føroya Tele. Harumframt hava nógvar fyritøkur sínar postskipanir liggjandi á servaranum.

Runt roknað verða 56.000 emailar um dagin sendir ígjøgnum postskipanina hjá Føroya Tele, fleiri hundrað teirra eru virusmailar, metir Páll Wiberg Joensen.

Meginparturin av emailunum, sum sendir verða í Føroyum, fara soleiðis um hendan eina postservara, og ætlaða loysnin á virustrupulleikanum er at kanna hvønn einasta email, sum kemur um hendan postservararan. Tey vanligastu telduvirusini breiða seg nevniliga ígjøgnum email.

- Vit hava síðan einaferð í februar mánað arbeitt við at fáa eina virusskanningarskipan at virka, sum skal tryggja, at allir emailar, ið innihalda virusfilar, ongantíð verða sendir út til móttakaran. Soleiðis ætla vit at forða fyri at virus kann breiða seg ígjøgnum okkara postskipan, og tað átti at hjálpt rættiliga væl um virustrupulleikan, sigur leiðarin á IP-net deildini hjá Føroya Tele. Skipanin er komin í rættlag, og áðrenn hendan vikan er liðin, verður hon sett til, og tá minkar virustrupulleikin væntandi stórliga.

## Í karantenu

Í juli mánað hava teir royndarkoyrt skipanina, sum helst verður tikin í nýtslu í hesum mánaðinum. Hendan tænastan verður ókeypis, og brúkararnir fara sambært leiðaranum á IP-net deildini ikki at merkja nakran mun - so leingi eingin sendir teimum ein virusmail.

- Verður ein mailur, sum breiðir virus, sendur til tína adressu, verður hann í framtíðini settur í karantenu. Tú fært síðan um postskipanina upplýst, at tú hevur fingið ein mail frá hesum ella hasum móttakaranum, sum inniheldur virus. Vísir hetta seg at vera ein sera umráðandi mailur, ber altíð til at fáa hann sendan kortini umvegis okkum. Mailarnir verða ikki slettaðir í fyrstu atløgu, sigur Páll Wiberg Joensen.

At Føroya Tele nú fer at kanna allar mailar fyri virus merkir tó ikki, at teldubrúkararnir eiga at gloyma at dagføra virusskannaran á teirra egnu teldu.

- Virus kann breiða seg á aðrar mátar, til dømis við at nýta diskettur, sum áður hava verið í virusraktum teldum, so tað verður enn orsøk til at verja seg við egnum virusskannara. Men við hesi skipanini fáa vit tað vanligastu viruskelduna burtur, sigur leiðarin á IP-net deildini, Páll Wiberg Joensen.



*Fólk hava einaferð installerað ein virusskannara, og so gloyma tey alt um hann, og halda væl standa til. Men ein virusskannari einki verdur, um ikki hann verður dagførur javnan, sigur Páll Wiberg Joensen, leiDari a IP net deildini hja Føroya Tele.*

## Hackarajagstran

INNBROT
*Rúnar Reistrup*

Umframt vaksandi virustrupulleikan taka telduserfrøðingarnir á IP-net deildini sær eisini av at finna slóðir eftir sonevndum hackarum, sum royna at sleppa sær ígjøgnum trygdarhol í telduskipanum hjá fyritøkum og privatpersónum.

Støðuga leitanin eftir hackarum er partur av einum altjóða samstarvi millum internetveitarar, sum Føroya Tele er ein partur av. Soleiðis fær IP-net deildin boð frá onkrum útlendskum internetveitara um at ein hackari hevur framt eitt álop frá einari føroyskari teldu. Onkuntíð er talan um at føroyskar hackarar hava verið upp á spæl, og tá er tað uppgávan hjá Føroya Tele at finna fram til, hvørjir hesir eru, men í flestu førum verða álopini framd av útlendskum hackarum, sum frammanundan hava brotið inn í eina føroyska telduskipan, sum so aftur verður brúkt sum útgangsstøð fyri álopinum á onkra telduskipan uttanlands. Hetta er ein nógv brúktur háttur hjá telduhackarum at fjala seg, soleiðis at slóðin frá hackaraálopinum ikki kann avdúka teir beinleiðis.

- Ì slíkum førum kanna vit slóðina hjá hackaranum, so vit síggja hvar hann er komin frá, og so verða teir upplýsingarnir sendir víðari til tann internetveitaran, sum slóðin leiðir til, greiðir Páll Wiberg Joensen frá.

Tá tey á IP-net deildini gerast varug við, at ein føroysk telduskipan er vorðin álopin ella nýtt sum millumstøð hjá einum hackara, fær tann, ið varir av telduskipanini, at vita um álopið, soleiðis at viðkomandi kann tryggja skipanina betur.

Føroya Tele fer ikki til løgregluna við slíkum málum. Tað er tann, ið varir av einari álopnari telduskipan, ið tekur avgerð um álopið skal meldast til løgregluna. Í hesum førum veitir Føroya Tele skjalaprógv fyri virkseminum hjá hackaranum.